# Liggur sum ein bumba undir Strandferðsluni

**– Tað slepst ikki undan at lækka túratalið hjá Strandferðsluni. Men fær leiðslan á Strandferðsluni rætt, verður neyðugt við enn fleiri tiltøkum**

STRANDFEÐSLA
*Áki Bertholdsen*



*– Strandferðslan skal í hvussu so er spara fýra milliónir í ár og tað fer at raka nokk so hart og tað slepst ikki undan at lækka túratalið. Kanska noyðast vit at spara enn meiri, men tað verður ógjørligt, sigur Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni.*

Tað er ongin ivi um, at Strandferðslan verður noydd til at skerja túratralið á summum rutum

– Tað slepst ikki uttanum, sigur Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni.

Og tað sigur hann í kjalarvørrinum á teimum politisku stigum, sum eru tikin hesa seinastu vikuna.

Tað hevur alla tíðina verið greitt, at Strandferðslan verður noydd til at útvega sær stórar eyka inntøkur í ár, skal játtanin halda - og tað skal hon.

Spurningurin er bara, hvussu tað verður gjørt!

Sjálv ætlaði Strandferðslan at útvega sær seks milliónir í eyka inntøkum við at hækka prísirnar á ferðaseðlum við Bygdaleiðum og við Strandfaraskipunum.

Men harumframt skuldi hon spara 7,5 milliónir fyri at fáa alt at mala runt. Nakað av tí kundi hon spara við tað, at siglingin inn á Skálafjørðin og á Vág, verður strikað.

– Men eftir verða undir øllum umstøðum einar fýra milliónir, sum skuldi útvegast við sparingum.

– Og tað er púra greitt, at tað letur seg ikki gera, uttan at tað rakar tænastustøðið og at túratalið fer at lækka, sigur Kristian Davidsen.

– Skulu vit spara fýra milliónir, fer tað at merkjast væl og virðiliga.

Men, hvussu sparingarnar skulu fremjast, fer Strandferðslan at arbeiða við nú.

### Ein bumba undir Strandferðsluni

Men kanska verður støðan hjá Strandferðsluni uppaftur verri.

Á samgongufundi týsdagin varð avgjørt, at Strandferðslan sleppur bert at hækka prísin á ferðaseðlum eini 7% yvir ein kamb og tað er væl minni, enn Strandferðslan hevði skotið upp.

Upprunaliga ætlaði Strandferðslan bara at hækka ferðaseðlaprísin við Strandferðsluni og við Bygdaleiðum. Men samgongan gjørdi av at tað skuldi eisini verða dýrari at flyta farm við Farmaleiðum og at príshækkingin skuldi vera 7% yvir ein kamb.

Sostatt komu hækkingarnar at raka breiðari, enn Strandferðslan ætlaði, men afturfyri verður hækkingin ikki so ógvuslig.

Men tað er stór óvissa um, antin hækkingin upp á 7% verður nóg mikið.

– Strandferðslan metir, at hækkingin upp á 7% fer bara at geva eina meirinntøku uppá 2,5 milliónir.

Men samgongan hevur eina aðra fatan, tí hon metir, at tað er nóg mikið til at geva Strandferðsluni ætlaðu meirinntøkuna uppá seks milliónir, sigur Kristian Davidsen.

Hann sigur, at tað, sum er ógvuliga trupult at meta um, er, hvussu príshækkingin fer at ávirkað talið á ferðafólkum.

– Vit hava mett, at verða prísirnir hækkaðir 7%, fer tað at føra til, at ferðafólkatalið við Strandfaraskipunum fer at lækka 2%, at nøgdin av farmi fer at lækka 3% og at ferðafólkatalið við Bygdaleiðum fer at lækka 4%.

– Hinvegin hevur samgongan mett, at ein hækking uppá 7% fer ikki at ávirka talið á ferðafólkið og nøgdina av farmi yvirhøvur.

– Sostatt er er stór óvissa um tølini og vit hava avtalað við vinnumálaráðið, at vit skulu fylgja neyvt við gongdini í ferðafólkatali og farmi.

– Og verða frávik tann skeiva vegin, so at inntøkumetingin ikki fer at halda, skulu vit boða frá, tí so má málið takast uppaftur.

– Í øllum førum er grundarlagið, at príshækkingarnar skulu geva seks milliónir meiri í inntøkum.

Men Strandferðslan hevur altso mett, at hækkingin uppá 7% fer at geva 3,5 milliónir krónur minni í inntøku, enn Samgongan metir.

Og tað fer at liggja um ein bumba undir Strandferðsluni.

Tað ásannar stjórin á Strandferðsluni eisini.

– Verður tað metingin hjá samgonguni, sum er tann rætta, verður bara neyðugt at spara tær fýra milliónirnar, sum upprunaliga ætlað.

– Men verður tað metingin hjá Strandferðsluni, sum heldur, verður neyðugt at spara 3,5 milliónir afturat og tað kann elva til ógvuliga stórar trupulleikar.

– Og tað haldi eg er ógjørligt, sigur Kristian Davidsen.

### Elva til trupulleikar

Undir øllum umstøðum er tað greitt, at tað verður neyðugt at lækka túratalið niður fyri at spara tær upprunaligu fýra milliónirnar.

– Men skal uppaftur meiri sparast, hevur stjórin á Strandferðsluni onga hóming av, hvussu tað kann gerast.

– Tað eru ikki so nógvir møguleikar. At seta sparingar í verk, gerst ikki frá einum degi til annan, so eg dugi ikki at síggja, hvussu vit kunnu seta fleiri sparingar í verk.

Sostatt eru bara tveir møguleikar og teir eru at hækka ferðaseðlaprísirnar enn meiri ella at Strandferðslan fær eina eykajáttan á fíggjarlógini.

– Men tað verður so ein politiskur spurningur at taka støðu til, sigur stjórin á Strandferðsluni.

Her skal viðmerkjast, at tingmenn í samgonguni hava staðiliga boðað frá, at talan verður ikki um, at prísurin skal hækka meiri enn hesi sjey prosentini, sum eru avtalað. Tingmenn úr samgonguni hava eisini staðiliga boðað frá, at tað verður ikki talan um eykajáttanir, uttan at tað "stendur um lív".

Sostatt er als ikki sagt, at poltiisku trupulleikarnir hjá Strandferðsluni eru av. Tað er eisini væl hugsandi,at tað fer at elva til politiskar trupulleikar, tá ið tað kemur har til at skarvast skal av túratalinum her og har.

Í øllum førum hevur Hergeir Nielsen, sum er einasti samgongutingamður úr Suðuroy, sagt, at túratalið til Suðuroynna kann ikki vera lægri og verður túratalið ímillum havnina og Suðuroynna lækkað, tekur hann tað sum eina stóra provokatión.

Annars væntar stjórin á Strandferðsluni, at príshækkingarnar koma í gildið um eina viku ella so.

## Í stuttum

- Strandferðslan skal hava seks milliónir inn í meirinntøku við príshækkingum.
- Harafturat skal Strandferðslan spara 7,5 milliónir.
- Hon kann spara 3,5 við at Skálafjarðarsiglingin og siglingin á Vág halda uppat.
- Sostatt skulu fýra milliónir sparast afturat og tað letur seg ikki gera uttan at lækka túratalið.
- Strandferðslan sleppur at hækka prísirnar umleið 7% yvir ein kamb.
- Strandferðlan metir, at tað fer einans at geva 2,5 milliónir í meirinntøku.
- Men samgongan metir, at tað fer at geva 6 milliónir í meirinntøku.
- Heldur metingin hjá Strandferðsluni, skal hon sostatt finna 3,5 milliónir afturat.
- Og heldur stjórin á Strandferðsluni ikki ber til




*Strandferðslan sleppur at hækka prísirnar á ferðaseðlum eini 7%. Hon metir, at tað fer at geva 2,5 milliónir í meirinntøku. Men samgongan skúgvar metingina til viks, tí samgongan metir, at tað fer at geva seks milliónir*

# Strandferðslan fer nú at gera nýggjan prísbygnað

FERÐASEÐLAPRÍSIR
*Áki Bertholdsen*

Strandferðslan er nú farin undir arbeiðið at gera ein nýggjan prísbygnað fyri alla tað almennu samferðsluna.

Tað hevur ofta verið funnist at príspolitikkinum hjá Strandferðsluni. Ein atfinning hevur verið, at í summum førum er tað bíligiari hjá fýra fólkum at leiga hýruvogn ímillum bygdir enn tað er at brúka Bygdaleiðir og tað er heilt av lagi. Ein onnur atfinning hevur verið at tað ov stórur prísmunur á teimum ymsu leiðunum.

Kristian Davidsen sigur, at tað eru nógvar hugsanir um, hvussu tað kann gerast og teir arbeiða nú við ymsum hugskotum.

Hann dugir ikki at siga enn, hvat grundsjónarmiðið verður.

– Hetta er eitt mál, sum rakar rættiliga nógv fólk og tí er tað eitt arbeiði, sum skal fyrireikast væl og virðiliga og sum skal umhugsast gjølliga, áðrenn tað verður sett í verk.

Hann sigur, at tískil verður tað ikki enn, at ein nýggjur prísbygnaður kemur í gildi.

Spurningur er, hvat verður góðtikið, tí í stóran mun er talan um ein politiskan spurning.

– Í løtuni er eitt uppskot frammi um, at allar leiðir skulu kosta tað sama. Men spurningurin er, hvussu tað skal fíggjar og tað er eitt politiskt mál.

Kristian Davidsen sigur, at tann nýggi prísbygnaðurin skuldi helst ikki givið Strandferðsluni minni inntøkur enn hon hevur nú.

– Men eitt endamál er at gera prísskipanina einfaldari fyri at sleppa undan øllum bólkunum, sum nú eru. Eitt nú eru nógvir ymsir bólkar av bilum og tað er ikki lætt at hava við at gera, sigur strandferðslustjórin.



# Hugna sær við fótbólti millum túrarnar

ÍTRIV
*Vilmund Jacobsen*

Er vilji og hugur til steðar, er einki til hindurs hjá monnum, sum burtur av liva av tí, sum upp úr havinum kemur, at hugna sær millum túrarnar. Onkur heldur kanska, at hetta letur seg ikki gera, og tað veldst sjálvsagt um, hvussu nógv skipini eru úti, og hvussu langir túrarnir nú einaferð eru. Men tað eru ikki øll skip og allir bátar, ið hava so nógvar fiskidagar, at tey kunnu vera til fiskiskap alt árið. Og tá er hent hjá fiskimonnum, sum annars balast á havinum, at hava eitt hvørt ítriv at fara til. Verri er ikki, um hetta ítriv eisini gevur motión, sum ein fiskimaður eins og onnur hevur brúk fyri.

Í Ítróttarhøllini í Runavík tóku vit hesar myndirnar seinasta hóskvøld.

Jack og Niclas Højgaard, faðir og sonur, sigla báðir við línubátinum, Volunteer, sum Jack eigur. Teimum dámar væl at spæla fótbólt, tá ið høvið býðst, og tað er nú ikki so sjáldan. Teir eru við í "teaminum", sum spælir innandurafótbólt í Ítróttarhøllini í Runavík hóskvøld. Her møta teir trúgvir, hvørja ferð teir eru heima. Jack er ikki nakar ársungi, men kortini bæði lættur og fimur sum ein annar unglingi. Niclas er stríðsmaður burtur av á vøllinum.




*Tað er gott at hava okkurt at leska sær við, tá ið stríðið á vøllinum er av. Petur í Túni (tv.) siglir við Randi; Atli arbeiðir hjá Zachariasi Leitisstein, men er við garnaskipinum, Oknini, av og á.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Á Føroya Banka

Volunteer er ein lítil línubátur millum teir størru og talið av fiskidøgum, sum skipið hevur, er ikki óavmarkað. Tí ræður um at brúka dagarnar væl og soleiðis, sum veðrið hevur háttað sær seinastu tíðina, hevur ikki loyst seg at ligið úti. Volunteer hevur gjørt tríggjar stuttar túrar í ár, og væl er komið burtur úr. Nú bíða teir eftir líkindum at fara út á Føroya Banka at royna; har eigur Volunteer 30 fiskidagar. Várið er góð fiskitíð á Bankanum, men illsligt til veður.

Men tað er ikki bara veðrið, sum spælir inn. Tá ið fiskidagarnir eru avmarkaðir, verður eisini hugsað um prísin, ið fáast kann fyri fiskin. Tí verður eisini roynt at lagað stuttu túrarnar soleiðis, at fiskurin verður seldur á marknaðinum, tá ið trýstið er minst. Men tað er ikki altíð so lætt, tá ið aðrir sjálvsagt royna tað sama.

Bæði Jack og Niclas lata væl at, tí nógvur fiskur hevur verið at fingið - so nógvur, sum ongantíð áður.

Hóast fiskidagarnir eru avmarkaðir, ber væl til at fáa eina góða ársinntøku við tí fiskiskapi, sum verið hevur seinastu árini.

Okkurt árið hevur Jack keypt fiskidagar frá øðrum skipum, sum hava havt dagar til avlops.

### Petur og Atli

Petur í Túni, sum vit síggja á myndini saman við Atla Joensen, siglir við trolbátinum, Randi.

Hjá teimum er dagatalið heldur ikki óavmarkað. Skipið er lítið, tá ið náttúrukreftirnar spenna út vøddar sínar, soleiðis sum verið hevur í seinnu helvt av januar. Men stutt er á fiskileið. Tí kann Randi at fara út og koma innaftur eftir fáum tímum. Ein stuttur túrur er gjørdur í hesum árinum, og eisini hesin prógvaði, at nógvur fiskur er at fáa.

Randi er nútímansgjørd við bøttum umstøðum hjá manningini, og á brúnni eru nýggj tól og tvær teldur settar upp.

So, tað er ikki bara umborð á teimum størru skipunum, at hugsað verður um umstøðurnar og trivnaðin hjá manningini.

Maðurin á myndini við síðuna á Peturi í Túni, er Atli Joensen, ið er versonur, Petur Thomsen, sála, sum átti garnaskipið, Oknina. Atli arbeiðir hjá Zachariasi Leitisstein, men plagar at gera nakrar túrar við Oknini av og á.

Bæði Petur og Atli dáma væl at spæla fótbólt, og tað er næstan ikki tað hóskvøld, at Petur ikki tuskar runt í Ítróttarhøllini í Runavík - um Randi ikki er til fiskiskap



*Úr arbeiðsklæðum í venjingarbúna. Jack Højgaard er ikki nakar ársungi, men lættur og fimur sum ein unglingi.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Niclasi dámar væl at tuska runt í Ítróttarhøllini í Runavík, tá ið hann ikki er til skips. Hann er stríðsmaður burtur av.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen0*